*Heldur enn at kenna ræðslu hevði eg hetta dulda ótolnið. Og eina ringa samvitsku, tí at listin, sum fekk míni skyldfólk at falla í vónloysi, fyri meg var ein støða, eg kundi góðtaka. Tey stúrdu fyri, at okkurt fór at henda mær har burturi. Eg vildi til eitt stað, sum ikki kendi meg.*

Í eftirskriftini sigur Herta Müller, at evnið burturflyting ongantíð varð umrøtt beinleiðis, tað var tabu, tí tað minti um ta fascistisku fortíðina hjá Rumenia. Í sinum uppvøkstri hevur hon tí ikki hoyrt um, hvat fór fram í hesum legum. Tosað varð bara um tey árini við tilsipingum og ábendingum, sum hon ikki skilti:

Innihaldið í teimum skilti eg ikki, men eg kendi ræðsluna á mær.

## Paul Celan

Kanska er tað hetta, sum býr undir stílinum í skaldsøguni. Søgan er fortald í tíðarrað, men tað er ikki sjálv gongdin, sum ber søguna, tað eru myndheildirnar, tær surrealistisku og absurdu myndirnar, sum saman við eini staðfestandi, undirdrivnari lýsing av perverteraðum veruleika, av illgerðum og kýnismu, smúgva inn undir húðina á lesaranum.

Tað óunniliga, ófrættakenda huglagið, metaforurnar og tann samstundis næstan beri, í støðum eitt sindur góðvarið forteljandi stílurin fær ein at hugsa um tann jødiska yrkjaran Paul Celan, sum eins og Herta Müller vaks upp í Rumenia við týskum sum móðurmáli. Her verður serliga hugsað um yrkingina "Todesfuge", har Celan við endurtiknum motivum, sum í eini fugu, á kynstrugan hátt, men stutt og frystandi, lýsir líðingina í kz-legunum.

## "Eg veit, tú kemur aftur"

Áðrenn Leopold Auberg fór avstað, hevði omma hansara sagt við hann: "Eg veit, tú kemur aftur". Øll fimm árini í leguni er tað hetta, sum heldur honum uppi. Onga løtu var hann í iva um, at hann skuldi fáa frælsið aftur. Tá ið hann so kemur heim, kemur hann til ein gerandisdag, sum hann ikki kennir. Í leguni snúði tað seg um ikki at lata lívið og siðvenjuna har fáa vald á tí, sum var hansara samleiki ella sál, men at verja tað móti øllum ágangi. Heimkomin upplivir hann so, at tann heimliga verðin er tað fremmanda, at hann við sær ber eina aðra verð – leguverðina – sum hini ikki kenna, og sum hevur broytt hann upp á ein máta, so tey heldur ikki kenna hann.

*Tað finnast eingi hóskandi orð fyri tí at líða hungur. Eg noyðist enn í dag at vísa svongdini, at eg eri sloppin undan henni. Eg eti bókstaviliga lívið sjálvt, eftir at eg ikki nýtist at svølta longur. Eg eri stongdur inni i matsmakkinum, tá ið eg eti. Eg havi, síðan eg vendi aftur úr leguni fyri trýss árum síðani, etið móti hungursdeyðanum.*

## Hungureingilin

Ein høvuðsmynd gjøgnum alla skaldsøguna er hungureingilin, sum hevur hertikið alt pláss í sinni og kroppi hjá teimum, vakandi og sovandi.

*Eg komi tíðliga um morgunin deyðamóður frá náttararbeiði. Eg havi frí nú, átti at sovið og leggi meg og fái ikki. Í barakkini eru allar 68 sengur tómar, allir hinir eru til arbeiðis. Okkurt dregur meg út í tann garðtóma seinnapartin. Vindurin foykir sín tunna kava, hann ríkir mær í nakkanum. Við opnum hungri fer eingilin við mær til køstin aftan fyri kantinuna. Eg gangi stumblandi eitt petti aftan fyri hann, eg hangi skeivan í gómasigdini. Stig fyri stig gangi eg aftaná mínum fótum, um tað ikki eru hansara. Hungurin er mín kós, um tað ikki er hansara. Eingilin sleppur mær framum. Hann smæðist ikki, hann vil bara ikki verða sæddur saman við mær. So boyggi eg ryggin, um tað ikki er hansara. Min grammleiki er ráur, mínar hendur eru villar. Tað eru mínar hendur, rusk nertur eingilin ikki. Eg stingi eplaflusið í munnin og lati bæði eygu aftur, so føli eg tað betur, søtt og glarkent, tað frysta eplaflusið.*

**Tey endurgivnu brotini eru tikin úr:**
Herta Müller: Atemschaukel. Carl Hanser Verlag. München 2009.
"Herta Müller, "brisée" mais résistante." Samrøða í Le Monde 4. desember 2009.


STARVSLÝSING

# Sølu- og marknaðarleiðari

**Til sølu- og marknaðardeild okkara søkja vit eftir nýggjum leiðara, sum kann virka fyri framhaldandi menning av inntøkugrundarlag okkara**

Lýsingarinntøkur eru ein týðandi partur av tilverugrundarlagnum hjá føroysku fjølmiðlunum, og tí leita vit støðugt eftir nýggjum hættum at menna hendan partin av fyritøkuni. Tí er tørvur á fólkum, sum duga at fáa og ikki minst arbeiða víðari við góðum hugskotum.

Fremsta uppgávan hjá marknaðarleiðaranum er at hava ábyrgdina av allari vanligari lýsingaavgreiðslu og -samskipan. Í hesum er roknað dagliga samskipan av lýsingum, sum skulu í Sosialin og strategi fyri innheintan av nýggjum lýsingum, eins og tilrættisleggjan av arbeiðs- og mannagongdum á lýsingadeildini.

Eisini er tað uppgávan hjá leiðaranum at vera partur av arbeiðnum at menna fyritøkuna. Herundir at seta saman nýggj produkt á lýsingarøkinum. Greinan av marknaðarkanningum og nýtslu av hesum. Profilering av fyritøkuni mótvegis umheiminum og sum heild at styrkja fyritøkuna, soleiðis at marknaðarstøðan hjá fyritøkuni kann varðveitast og styrkjast.

Løn verður ásett sambært avtalu.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so er bert at senda eina umsókn við frágreiðing um útbúgving og royndir til okkum. Ynskir tú at fáa meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Jan Müller á tel. 341831. Tað ber sjálvandi eisini til at senda teldupost á jan@sosialurin.fo.

Umsóknarfreistin er 15. desember, og miða vit eftir at seta starvið tann 1. februar í 2010.

**Sosialurin**
Att.: Jan Müller
Postsmoga 76
FO – 110 Tórshavn

Sosialurin hevur seinnu árini vaksið um virksemið frá at vera eitt tíðindablað, til at verða størsta fjølmiðlafyritøka í landinum. Konsernin umfatar Sosialin, Rás2 og tíðindaflutningin á heimasíðunum á portal.fo, sum er fremsta heimasíðan í Føroyum. Í dag starvast tilsamans umleið 42 starvsfólk í konsernini.

Tórsgøta 1
Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Sosialurin

Sosialurin 341800